Fiskimálaráðið:

# Maskinmeistarafelagið fremur ágang móti umsøkjarum

**Nøvnini á umsøkjarunum til størvini sum maskinmeistari umborð á Brimli og Tjaldrinum verða ikki latin Maskinmeistarafelagnum, slær Fiskimálaráðið fast. Orsøk: Upplýsingarnar skulu nýtast til at fremja ágang móti umsøkjarunum**



*Frá vinstru: Poul Hansen, advokatur, Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, og Elmar Højgaard, stjóri í Fiskiveiðieftirlitinum. Á tíðindafundi hósmorgunin gjørdu teir greitt, at maskinmeistararnir, sum søgdu seg úr starvi, ikki verða settir beinleiðis aftur í gomlu størvini. Harumframt verður sligið fast, at Maskinmeistarafelagið ikki fær nøvnini á teimum umsøkjarum, sum hava søkt størvini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

TRÆTA
*Stefan í Skorini*

– Upplýsingarnar skulu nýtast til at fremja ágang móti teimum sjey umsøkjarunum, sum hava søkt størvini sum maskinmeistarar hjá Fiskiveiðueftirlitinum, og vit vilja við hesi avgerð verja umsøkjararnar, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

Maskinmeistarafelagið hevur sent eina skrivliga umsókn um at fáa upplýst nøvnini á teimum sjey maskinmeistarunum, sum hava søkt tey leysu størvini umborð á Tjaldrinum og Brimli, hóast fakfelagið hevur noktað limum sínum at søkja størvini.

Hetta kravið verður ikki eftirlíkað, tí at upplýsingarnar verða misnýttar, heldur Fiskimálaráðið.

### Umsøkjarar tora ikki

Sjey umsøkjarar hava upprunaliga fingið tilboð um starv, men fýra teirra hava skrivliga boðað frá, at teir ikki taka við størvunum.

Soleiðis sigur ein av umsøkjarunum, sum ikki tók av:

– Undirritaði torir ikki at taka við starvinum frá tykkum vegna ágang og uppringingar frá Maskinmeistarafelagnum.

Ein annar sigur:

– Hóast talan var um eitt ynskistarv hjá mær, havi eg í samráð við familjuna og fólk, ið kenna til fakfelagsviðurskifti, avgjørt ikki at taka við starvinum...

Poul Hansen advokatur hevur verið ráðgevi hjá Fiskimálaráðnum í hesum málinum, og hann er avgjørdur.

– Ætlanin við upplýsingunum er at fremja ágang móti umsøkjarunum, og tí eigur Fiskiveiðieftirlitið at sýta fyri at upplýsa nøvnini á umsøkjarunum, er niðurstøðan hjá Poul Hansen.

Hóast tænastumannalógin sigur, at avvarðandi fakfeløg eiga at fáa upplýst nøvn á umsøkjarum, so heldur løgfrøðingurin seg til eina avgerð hjá danska umboðsmanninum. Hon sigur, at um tað er dokumenterað, at upplýsingarnar verða nýttar til at fremja ágang móti persónum, so ber til at seta tænastumannalógina til viks og verja tann einstaka.

### Avsannar ágang

Formaðurin í Maskinmeistarafelagnum avsannar, at upplýsingarnar skulu nýtast til at fremja ágang.

– Vit hava rætt sambært lógini at fáa upplýst nøvnini, men vit hava ongar ætlanir um at fremja ágang móti umsøkjarum ella at upplýsa nøvnini fyri almenninginum, sigur Jógvan Nybo.

Hann sigur seg ikki kennast við tær uppringingar, sum ein umsøkjari sigur seg hava fingið frá Maskinmeistarafelagnum.

– Eg havi ikki ringt til nakran, og eg veit ikki um nakran annan í felagnum, sum hevur gjørt hetta, sigur formaðurin, sum leggur afturat, at hesar ákærur frá Fiskimálaráðnum eru sera grovar.

Hann sigur, at tað einasta, sum upplýsingarnar møguliga kundu verið nýttar til, er at ringja til umsøkjararnar og greiða teimum frá støðuni, so at teir møguliga skilja málið betur.

– Vit ivaðust annars ikki í, at vit fóru at fáa nøvnini á umsøkjarunum, sigur Jógvan Nybo.

Teir fara tó so nakkalangir úr Fiskimálaráðnum, tí Jacob Vestergaard vil ikki upplýsa nøvnini.

Nevndin í Maskinmeistarafelagnum fer nú at hava fund um málið og gera av, hvat gerast skal víðari í málinum.


YVIR-STÝRIMAÐUR
TIL MF NORRÖNU

Søkt verður eftir yvirstýrimanni til Norrönu at byrja sum skjótast.
Viðkomandi skal ikki vera yvir 45 ár, skal hava hollar royndir sum yvirstýrimaður/ skipari við stórum skipum (yvir 10.000 BT) umframt øll prógv/ skeið, ið krevjast til ferðamannaskip í altjóða sigling.
Umsóknir saman við avriti av prógvum og CV skulu stílast til stjórnina og vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 28. mai 2003.

SMYRIL LINE
Postboks 370
110 Tórshavn

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Nýggja Norröna er 36.000 BT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og sluppina "Norðlýsið".


# Maskinmeistararnir fáa ikki størvini aftur

**Teir maskinmeistararnir, sum søgdu seg úr starvi, verða ikki settir beinleiðis aftur í tey gomlu størvini, sigur Jacob Vestergaard**

ARBEIÐSTRÆTA
*Stefan í Skorini*

– Borðið fangar. Teir hava sagt seg úr starvi, og tí kunnu teir ikki bara fáa størvini aftur framum aðrar umsøkjarar, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður við fiskivinnumálum.

Hinvegin boðar fiskimálaráðið frá, at teir maskinmeistararnir, ið hava sagt upp, eru vælkomnir at søkja størvini, ið nú eru leys.

Hósmorgunin boðaði fiskimálaráðið til tíðindafund at greiða frá trætuni millum ráðið og Maskinmeistarafelagið, sum hevur noktað limum sínum at søkja størv hjá stovninum.

Knúturin er tó ikki loystur, men støðan tykist enn meira fastløst.

### Halda seg til lógina

– Vit halda okkum til lógina, og vit kunnu í veruleikanum ikki gera øðrvísi, sigur Jacob Vestergaard.

– Tá tænastumenninir hava sagt seg úr starvi, og myndugleikin alment hevur lýst hesi størv leys at søkja, hava hesi størv verið leys, og setanin av teimum má tí fara fram eftir ásetingunum í tænastumannalógini grein 5. Um uppsagnirnar verða annuleraðar er tað tí eftir míni fatan brot á grein 5 í tænastumannalógini, sigur Poul Hansen, advokatur.

Maskinmeistarafelagið krevur framvegis, at gomlu maskinmeistararnir fáa størvini aftur, og Jógvan Nybo, formaður, sigur, at allir løgfrøðingar ikki eru samdir í hesum málinum.

### Skilja ikki uppsagnirnar

Elmar Højgaard, stjóri í Fiskiveiðieftirlitinum, sigur, at hann ongantíð hevur fingið eina góða grundgeving fyri uppsagnunum hjá maskinmeistarunum, tá teir søgdu seg úr starvi.

– Vit hava onga grundgeving fingið frá maskinmeistarunum fyri, hví teir hava sagt seg úr starvi. Hann vísir á, at eftirlønarviðurskiftini vóru fingin í rættlag, og tí var eingin orsøk hjá teimum at rýma, sigur Elmar Højgaard.

– Hatta er lygn. Elmar Højgaard veit væl av, at eftirlønarviðurskiftini hjá avloysarunum ikki vóru komin í rættlag, svarar Jógvan Nybo afturímóti.

### Óvissa

Tilsamans tólv maskinmeistarar vóru í starvi umborð á Brimli og Tjaldrinum. Ellivu søgdu seg úr starvi. Síðani vórðu sjey aðrir settir í starv, men fýra av teimum tóku ikki av.

Sostatt hevur Fiskiveiðieftirlitið fýra maskinmeistarar at ráða yvir. Tískil ber til at manna Tjaldrið og røkja fiskiveiðieftirlitið við Føroyar. Óvist er, hvussu verður við Brimli, tí eingin er at passa maskinrúmið.



# Ræðast ikki hóttanir frá fúta ella arbeiðsgevarum

**Misnøgdin er stór í Føroya Arbeiðarafelag, nú Arbeiðsgevarafelagið er komið alment fram við skrivi, sum danska løgmálaráðið hevur skrivað í samband við kæru, sum arbeiðarafeløg sendu um framferðina hjá løgregluni undir verkfallinum í 2001. - Eingin ivi er um, at fútin ella varafútin hevur latið Arbeiðsgevarafelagnum avrit av skrivinum, sigur Føroya Arbeiðarafelag**

VERKFALL
*Dagfinn Olsen*

- Hetta váttar bert illgruna okkara um, at fútin og løgreglan ganga ørindi arbeiðsgevarana, verður sagt á Føroya Arbeiðarafelag.

- Brævið hava teir óivað fingið av fútaskrivstovuni, sigur Føroya Arbeiðarafelag.

Har verður mett, at tað at Arbeiðsgevarafelagið er farið í fjølmiðlarnar við brævinum er tekin um, at fútin og løgregla tæna arbeiðsgevarasíðuni, tá fakfeløg royna at vinna limum sínum sømulig kor.

- Hetta, at løgreglan tænir teimum, sum hava valdið í samfelagnum, er einki nýtt, tí somu royndir hava fakfeløg í grannalondunum, sigur Føroya Arbeiðarafelag.



*Ingeborg Vinther, forkvinna í FA er sera misnøgd um svarið uppá kæruna frá arbeiðarafeløgunum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Eingin kanning

Føroya Arbeiðarafelag vísir á, at tey høvdu fleiri dømi um, at ymiskt fór fram undir verkfallinum í 2001, sum ikki eigur at koma fyri í einum rættarsamfelag, men danska løgmálaráðið helt einki vera at seta fingurin á, grundað á frágreiðing frá løgregluni, ið ikki metti, at nakað skeivt varð gjørt.

- Hvussu kunnu vit vænta annað, tá løgreglan skal kanna seg sjálva?, spyr Føroya Arbeiðarafelag.

### Løgreglan leggja upp í

Í skrivi siga Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag, at ilt er ikki at lesa ímillum reglurnar, at Arbeiðsgevarafelagið aftur hesaferð vil hava løgreglu og fútan at leggja seg út í verkfallið, sum er lógligt, leggja feløgini dent á.

- Vit skulu tó gera bæði Arbeiðsgevarafelagnum og fútanum greitt, at vit ætla ikki at lata okkum ræða av beinleiðis og óbeinleiðis hóttanum teirra, siga Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag í svarskrivi til tíðindini um, at Arbeiðsgevarafelagið er farið í miðlarnar við skrivi frá løgmálaráðnum.


FÓLK TIL MÓTTØKUNA

Søkt verður eftir dugnaligum fólki til móttøkuna umborð á Norrönu.

Smyril Line søknast eftir fólki við royndum á høgum, altjóða tænastustigi. Tað er eitt krav, at umsøkjararnir duga væl danskt og enskt og annars hava kunnleika til hini norðurlendsku málini umframt týskt ella onnur fremmandamál. Tað er ein treyt, at móttøkufólkini hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið. Heilsuprógv fyri sjófólk krevst.

Smyril Line bjóðar starv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning. Fleiri upplýsingar fáast hjá Andriasi Joensen, manningarleiðara, á tel 34 59 00 ella 34 59 78.

Umsóknarfreistin er mánadagin 2. juni. Umsóknir og CV skulu sendast til:

Smyril Line
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn

Ella við teldupostí til:
technical@smyril-line.fo

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Nýggja Norröna er 36.000 BT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og sluppina "Norðlýsið".



3 størv við Streymin

**Til kassaavgreiðsluna í inn**, søknast vit eftir einum dugnaligum og fyrikomandi fólki. Starvið er sett til 35 tímar um vikuna mánadag - fríggjadag frá kl. 09.00 - 16.00. Starvstíðin er avmarkað til eitt ár frá 1. august 2003 til 1. august 2004.

**Til kassaavgreiðsluna í inn**, søknast vit eftir einum ungum skúlanæmingi at arbeiða aftaná skúlatíð og í vikuskiftinum aðruhvørja viku. Hetta starvið verður sett 1. august 2003.

**Til ymiskt fyrifallandi arbeiði í inn**, søkja vit eftir einum ungum skúlanæmingi at arbeiða aftaná skúlatíð og í vikuskiftinum aðruhvørja viku. Hetta starvið kann setast beinanvegin.

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja til Jaspur Johannesen á tlf. 474000.
Skrivlig umsókn við møguligum prógvum/ viðmælum, verður at senda innan 1. juni 2003 til:

inn
við Streymin
Postsmoga 50
460 Norðskáli

inn

Matvøruhandilin við Streymin



BILATORGIÐ



**NISSAN SIRENA 7.PERS DIESEL**
Árg Sept.95, 7. Persónar 2.3 Diesel høgrastýrdur . Kr. 50.000.



**SUBARU 1.8 4.WD STATIONCAR**
Árg Maj 87, Km 197.000.
Kr. 25.000.



**HONDA HRV. VTEC 4WD**
Árg Nov. 01, Km 39.000.
Aircondition-Alufelgur-Takspoylara-C.D.Anlegg-Fjarðstýrt centrallás-El.Rútar-El.-Spegl-Sleipikrók v.m..
Kr. 156.000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL HATCHBACK**
Árg Dec-96, Km 105.000.
Kr. 56.000.



**KIA PRIDE 1.3 STATIONCAR**
Árg Juli. 01, Km 24.000.
C.D.Anlegg - Centrallás- El. Rútar-El.Antennu v.m.. Kr. 95.000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL STATIONCAR**
Árg Okt.95, Km 105.000.
Kr. 56.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mars 97, Km 150.000.
Fjarðstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-Spoylara aftan- Alufelgur-v.m.. Kr. 56.000.



**FORD ESCORT 1.8 DIESEL SEDAN**
Árg Okt. 95, Kr. 50.000.



**SUZUKI WAGON R 1.2**
Árg Maj 00, Km 42.000. C.D Anlegg- El rútar- El.spegl-Síðuspoylarar- Takspoylara-sleipikrók- píkadekk v.m..
Kr. 86.000.



**ROVER 620 GSDI 2.0 DIESEL**
Árg Dec. 99, Km 146.800. Leður setur- Aircondition- Fjarðstýrt centrallás- El. Sóltak- El. rútar- El. spegl. Kr. 165.000.



**HYUNDAI PONY 1.4**
Árg Juni 92, Km 156.000.
Kr. 30.000.



**MAZDA 626 HATCHBACK**
Árg Apríl 89, Kr. 10.000.

P/f. D. B. Bilar
Jónas Broncksgøta 15
Tel. 310600 - Fax 310650